# Mentamálaráðið

**Mentamálaráðið**

Dagfesting: 19.12.2018
Mál nr.:
Málsviðgjørt: FP/TH/JN

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð**

**(skipa serflokkar)**

Við heimild í § 45, stk. 7 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011 og løgtingslóg nr. 44 frá 30. apríl 2018, verður ásett:

## Skipan og málbólkur

**§ 1.** Serflokkar eru undirvísingartilboð í fólkaskúlanum, har veitt verður serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligur stuðul.

*Stk. 2.* Málbólkurin eru næmingar í fólkaskúlanum, sum ikki fáa nøktandi skúlatilboð í vanligu skipanini í fólkaskúlanum.

*Stk. 3***.** Miðað verður eftir, at næmingarnir taka 9. floks prógvi ella 9. fl. við støðumetingarskjali sbrt. kunngerð kunngerð nr. 15 frá 28. februar 2013 um próvtøkur fólkaskúlans.

*Stk. 4***.** Serflokkur er vanliga fyri næmingar frá 4. flokki til og við 10. flokk.

**§ 2**. Eftir góðkenning Mentamálaráðsins, sbrt. § 7, stk. 2 í kunngerð nr. 127 frá 12. september 2018 um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul, verða serflokkar skipaðir.

*Stk. 2.* Góðkenning Mentamálaráðsins er grundað á fakligt tilmæli frá Sernámi og játtanarligt tilmæli frá Undirvísingarstýrinum í samráð við einstaka skúlan ella skúlaeind/skúlaøki, har serflokkurin verður staðsettur.

**§ 3.** Serflokkur verður skipaður sum serligt skipað undirvísingartilboð undir skúlaleiðsluni í tí skúla, har serflokkurin er staðsettur og við sernámsfrøðiligari ráðgeving frá Sernámi.

**§ 4.** Sernám hevur vegna Mentamálaráðið, yvirlit og innlit yvir næmingatal, skipan og arbeiðið í serflokkunum.

## Leiðslu- og starvsfólkaviðurskifti

**§ 5.** Starvsfólkini verða sett í skúlanum, arbeiða í serflokkinum, og eru skipað í toymi við toymisleiðara sbrt. avtalu um sjálvstýrandi toymi í serflokkum.

*Stk. 2.* Starvsfólk eru lærarar og námsfrøðingar við møguligari eftirútbúgving innan serøkið.

**§ 6.** Skúlaleiðarin setur toymisleiðara eftir tilmæli frá setanarbólki. Setanarbólkurin er umboð fyri skúlastýrið, Sernám, starvsfólk umframt skúlaleiðaran, sum er formaður í bólkinum.

*Stk. 2.* Toymisleiðarin er fólkaskúlalærari við eftirútbúgving innan serøkið ella hevur aðra samsvarandi námsfrøðiliga útbúgving við eftirútbúgving innan serøkið.

*Stk. 3.* Skúlaleiðarin setur starvsfólk eftir tilmæli frá setanarbólki. Setanarbólkurin er umboð fyri skúlastýrið, Sernám, toymisleiðari umframt skúlaleiðaran, sum er formaður í bólkinum.

**§ 7.** Toymisleiðarin samskipar og hevur dagligu og fakligu leiðsluna og ábyrgdina av arbeiðinum í serflokkinum.

*Stk. 2.* Starvsfólkini í serflokki luttaka á námsfrøðiligum fundum og øðrum felags tiltøkum í skúlanum eftir avgerð skúlaleiðarans og í samráð við toymisleiðaran.

## Hølisviðurskifti

**§ 8.** Serflokkur hevur egin høli, sum skulu vera egnað til endamálið.

*Stk. 2.* Serflokkur hevur atgongd til fak- og serhølini í skúlanum. Hetta verður samskipað við leiðslu skúlans.

## Játtan

**§ 9.** Starvsfólkatal og samanseting er skipað við grundarlagi í normeringini 1:3 millum starvsfólk og næmingar.

*Stk. 2.* Í serligum førum grundað á tørvin hjá einstøku næmingum í serflokkinum, kann víkjast frá ásetingini í stk. 1.

**§ 10.** Næmingar í serflokki telja sum aðrir næmingar í skúlanum, tá ið tað viðvíkur føstum rakstrarútreiðslum hjá skúlanum til m.a. ljós, hita og reingerð.

## Innihald og skipan

**§ 11.** Toymisleiðarin ger í samráð við toymið ársætlan og skipan fyri serflokkin, sum skal verða tøk við skúlaársbyrjan.

**§ 12.** Toymisleiðarin ger í samráð við toymið í serflokkinum einstaklinga læru- og menningarætlan fyri næmingin í seinasta lagi tveir mánaðir eftir, at næmingurin er byrjaður í serflokkinum. Hesar skulu eftirmetast hálvárliga.

*Stk. 2.* Hvør næmingur og foreldur/avvarðandi hevur eitt kontaktfólk í serflokkinum.

*Stk. 3.* Undirvísingin verður skipað við støði í persónligu-, sosialu- og fakligu fortreytunum hjá einstaka næminginum.

*Stk. 4.* Skúladagurin hjá næmingum í serflokki er vanliga frá kl. 08.00 – 13.00.

## Atgongd og tilknýti til Sernám og Førleikastovu

**§ 13.** Sernám er høvuðsráðgevandi eindin og skal hava yvirlit og innlit í, hvat serflokkurin fevnir um.

*Stk. 2.* Tilknýtið og atgongd til servitan frá Sernámi er skipað eftir avtalaðum leisti við Sernám, við m.ø. hesum tættum:

1) Regluliga supervisjón
2) Regluliga sernámsfrøðiliga ráðgeving
3) Atgongd til sálarfrøðing eftir tørvi

4) Annað eftir nærri avtalu millum skúlan og Sernám

*Stk. 3.* Tilknýtið og atgongd til servitan frá Førleikastovuni fatar um:

1) Vegleiðing og ráðgeving innan tey fakøki, ið Førleikastovan fevnir um.
2) Vegleiðing og ráðgeving viðvíkjandi tilfarsvali v.m.

*Stk. 4.* Samstarv skal vera millum Sernám og Førleikastovuna.

### Ávísing, tilráðing og upptøka

**§ 14.** Ávísing til serflokk er treytað av, at mett verður, at tað er gagnligt fyri næmingin at fáa undirvísing í serflokki í styttri ella longri tíðarskeið.

**§ 15.** Sernám og viðkomandi skúli skulu gera meting og tilráðing til, at næmingur fer í serflokk. Henda tilráðing verður gjørd í samráð við foreldur og næming í tí vavi, tað er hóskandi.

*Stk. 2.* Næmingur kann bert vera fluttur í serflokk í samráð við og eftir tilmæli frá Sernámi og foreldrum/avvarðandi.

§ **16.** Í upptøkubólkinum til serflokkin er toymisleiðarin fyri serflokkin, sum er formaður. Hini umboðini eru umboð fyri Sernám, umboð fyri leiðslu skúlans/Førleikastovuna og umboð frá skúlanum, har næmingurin er innskrivaður.

**§ 17.** Upptøka fer fram samstundis sum upptøkan í skúlan annars, og skal verða avgreidd í seinasta lagi í mai mánaði til komandi skúlaárið. Tað kann koma fyri, at upptøka fer fram í úrtíð.

**§ 18.** Næmingar kunnu koma úr skúlum í øðrum kommunum. Skúlin boðar avvarðandi kommunu frá, um næmingur flytur í serflokk í aðrari kommunu.

§ **19.** Um næmingur gongur í serflokki hjá øðrum skúlamyndugleika, enn í tí kommunu, hann er búsettur, verða skúlaútreiðslurnar goldnar av kommununi, har næmingurin býr.

### Gildiskoma

**§ 20.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, xx. desember 2018.

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen